# Próvhandan á landbúnaðar-deplinum

**Týsdagin 29. januar var samkoma á landbúnaðardeplinum í Kollafirði har 23 næmingar, ið hava fullført útbúgvingina "Yrkisskeið innan landbúnað" fingu handað prógv**

Hetta er eitt yrkisskeið sum Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli skipar fyri í samstarvi við Mentamálaráðið og sum m.a.gevur næmingunum rætt til at søkja festi.

Útbúgvingin fevnir um seks lærugreinir við tilsamans 200 tímum. Lærugreinarnar eru búskapur, húsdjór, lívfrøði og náttúra, plantur, tøkni og verkætlanir. Tey sum hava luttikið á skeiðnum eru úr øllum landinum, bæði ung og eldri, kvinnur og menn, verandi og komandi bøndur.

### Dugnaskapsprógv til frítíðarsiglarar

Kvølskúlin er eisini farin undir eina útbúgving fyri frítíðarsiglarar í samstarvi við Vinnuháskúlan. Hetta er ein útbúgving í siglingarlæru, sjóreglum, veðurlæru og trygd, havumhvørvi, sjómansskapi og nýtslu av GPS og radara. Útbúgvingin hevur til endamál, at næmingarnir skulu fáa eina so holla vitan, at teir trygt kunnu føra bát undir øllum umstøðum, sigur Jákup P. Strøm, sum leggur afturat at skeiðið er fullteknað, men heldur áfram í heyst, um játtan fæst.



*Næmingarnir sum fingu prógv í útbúgvingini "Yrkisskeið innan landbúnað" eru: Bergur Berg, Hans Andreas N. Dahl, Martin Eið, Jan í Horni, Dorthea Joensen, Heri Jógvan Joensen, Jógvan Joensen, Per Joensen, André Kruse, Rasmus Magnussen, Fríðfinn Nicolajsen, Gunnfríður Dahl Olsen, Jógvan Fróði Olsen, Karl Petersen, Kári á Presttrøðni, Tórður á Presttrøðni, Konnie Reinert, Sanna Silvurstein, Jóhan Simonsen, Anfinnur Thorsteinsson, Mortan Vang, Torkil Zachariassen og Jóannes V. Rasmussen*

*Mynd: Jens Jákup Hansen*




# The Dreams eru favorittar

**Veddingafyritøkurnar hava føroyska bólkin The Dreams sum favoritt til at vinna danska Grand Prixið leygarkvøldið. Harðasti kappingarneyti verður Simon Mathew**

GRAND PRIX
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Donsku veddingarfyritøkurnar kenna seg vísar í, at tað verður antin føroyski punkbólkurin The Dreams ella danska poppstjørnan Simon Mathew, sum fara at vinna danska Grand Prixið leygarkvøldið.

Hjá Bet24 verður mett, at The Dreams hevur besta møguleikan at vinna kappingina, meðan Scandic Bookmakers halda, at Simon Mathew er besta boðið.

The Dreams taka lut við einum heldur øðrvísi sangi, tá ið tað snýr seg um Grand Prix. Ekstrablaðið hevur skírt hetta rópirock, og tað kann verða ein stórur fyrimunur fyri The Dreams, at teirra sangur hoyrist burtur úr rúgvuni.



*Føroyski rópirockurin er favorittur til at vinna danska Grand Prixið leygarkvøldið*

The Dreams fóru í fyrstu syftu við í Grand Prixið fyri at gera vart við seg, áðrenn fyrsta fløgan hjá teimum í Danmark kemur út beint eftir Grand Prixið. Men nú er bólkurin alt í einum favorittur til at vinna kappingina, og tað kann verða, at føroyingar kunnu gera munin í atkvøðugreiðsluni leygarkvøldið.

Føroyingar fáa møguleikan at atkvøða við sms, og tað kann gerast við at senda "sang 09" til telefon nummarið 1212.

